

Arnbjørn Sivertsen

Bridge

N / Allir

	♠ 10-9-8-4-3 ♡ 3 ◇ Q-2 ♣ A-K-J-9-7	
♠ J-7 ♡ A-K-Q-10-8-7-6 ◇ 6 ♣ Q-6-4	N V E S	♠ 6-2 ♡ 9-4 ◇ K-J-10-9-5-3 ♣ 10-8-2
	♠ A-K-Q-5 ♡ J-5-2 ◇ A-8-7-4 ♣ 5-3	

N	E	S	V
Helgi	Oddmar	Dánjal P.	Henriette
2 sp 1)	pass	2 ut 2)	pass
3 rút 3)	pass	3 hj 4)	pass
3 ut 5)	pass	4 sp	pass
pass	pass		

1) 5 - 10 HP, minst 5 - 4 í ávikavist spaðara og kleyvara ella hjartara og rútara.
2) Spyr um styrki.
3) Max. (8 - 10)
4) Hvørjir eru litirnir?
5) Spaðari og kleyvari

Útspæl: hj 9

Her er eitt av spølunum frá kappingini í Norðurlandahúsinum seinasta sunnudag. Vit siggja hvussu Helgi og Balli melda 4 sp.

Teir nýta her eina heimagjørda konventión, sum líkist einari hjá íslendingum, og kalla teir hana tí »Javarin«.

Eystan spælir hjartara út, og Helgi fær 12 stikk. Hann trumfar tann næsta hjartaran, tekur trumf tvær ferðir og sneiðir síðan við kleyvaradreingi. Kleyvarin verður nú góður, og teir tríggir rútarataparnir á bordinum hvørva undir kleyvaran. Restin verður krosstrumfað.

4 sp + 6 gav teimum 85 stig av 100 møguligum (miðal er 50), og var hetta eitt stig á leiðini til fyrsta plássið í NS-raðnum.

Sum tann gløggi lesarin longu hevur lagt til merkis, havi eg hesa ferð nýtt ensku merkini fyri ess, kong, frúgv og drong. Eftir fleiri áheitanir, havi eg avgjørt at gevast at nýta tey føroysku (E,K,F og Dr). Orsøkin er tann, at tað hjá nógvum lesarum er torført at fáa yvirlit yvir kortini. So leingi føroyingar spæla við útlendskum kortum, fer bridgeteigurin tí at nýta tey ensku merkini (A,K,Q og J), sum eru vanlig í millumtjóða kappingum. Tað ynskiliga hevði verið, at vit fingu kort við teimum føroysku merkjunum at spæla við, men hetta er helst lættari sagt enn gjørt.

Bridgeskúlin hjá teimum trimum feløgunum í Havn fer nú í gongd aftur. Kenna tit onkran, tit vita ella halda kundi hugsað sær at lært at spæla bridge, so sig teimum frá. Ein nærri frágreiðing um skúlan kemur í blaðið leygardagin.

Avreiðingarprísir

Sambært løgtingslóg nr. 15 frá 5. mai 1975 við seinni broyting, ásetur Nevndin fyri Ráfiskagrunnin hesar minstuprísir frá vekt keyparans (í krónum):

I. Fyri fyrsta flokks*), fullblóðgaðan), sløgdan fisk við høvdi:**	
Toskur yvir 70 cm 1A	8,50
Toskur yvir 70 cm 1B	4,70
Toskur 44-70 cm 2A	5,70
Toskur 44-70 cm 2B	3,05
Hýsa yvir 40 cm 1A	7,00
Hýsa yvir 40 cm 1B	3,05
Brosma yvir 42 cm	4,85
Longa	6,40
Upsi yvir 55 cm 1A	5,05
Upsi yvir 55 cm 1B	1,30
Upsi 45-55 cm 2	1,60
Steinbítur	2,95
Hvítingur yvir 31 cm	3,20
Blálonga	4,90
Kalvi 1-4 kg	9,60
Kalvi yvir 4 kg	17,05
Svartkalvi 1-3 kg	6,35
Svartkalvi yvir 3 kg	7,50
Reyðsprøka yvir 300 gr	3,20
Tunga yvir 300 gr	8,50
II. Fyri fyrstaflokks*), sløgdan fisk við høvdi:	
Havtaska yvir 3 kg	12,80
III. Fyri fyrstaflokks*) rundan og ísaðan fisk:	
Kongafiskur yvir 700 gr	4,85
Svartkjaftur til matna	1,40
Gulllaksur til matna	2,15

IV. Fyri væl ísað rogn, sum eru rein (væl vaskað) og frí fyri garna- og innvølsrestir:
Toskarogn/Upsarogn (Avreiðingarprísir á rogni verða lýstir 1. desember 1988)

Nevndu prísir eru galdandi fyri tíðarskeiðið: **1. oktober 1988 til: 31. januar 1989**

*) Fyrstaflokks merkir, at ásetanirnar í Reglugerð nr. 13 frá 4. mars 1974 um viðgerð av feskum fiski eru fylgdar. Somuleiðis ásetanirnar í Reglugerð nr. 47 frá 21. sept. 1973 um innrætting av og eftirlit við fiskavirkjum og fiskiførum v.m. við seinni broytingum (m.a. reglur um ising, datomerking, døgnseðlar og lastarplan v.m.).

**) Fullblóðgaður merkir eisini, at fiskurin er útbløddur. Prísurin á kalva er treytaður av, at hesin eisini er stungin gjøgnum geislan við rótina á stertinum, so ryggæðrin verður skorin av.

Tórshavn, 29. oktober 1988

NEVNDIN FYRI RÁFISKAGRUNNIN

Stak gott nýflett

FØROYSKT LAMBSKJØT

(bert heil krov)

fæst í

Vit hittast í

SMÆRUNI

M.a. Winthersgøta 2
Tlf. 1 15 49 — 1 10 47

Stórt úrval av brúktum møblum

Leður-sofasett, myrkabrúnt, við borði kr. 10.000,-.
Sofasett 1-2-3 kr. 2.500,-.
Hornasofa við stóli kr. 5.500,-.
Spísustovuborð við 4 stólum kr. 2.500,-.
Toilettmøbil kr. 600,-.
Hornaskáp kr. 3.000,-.
Dupultar sengur við náttborði kr. 500,-.
Ymiskar gardinur o.m.a.

Niðristova

Skrivaragøta 3 — tlf. 10310

Kunngerð

Hervið verður boðað frá, at høvuðsskattalistin fyri skattaárið 1987 liggur alment frammi á kommunuskrivstovuni í døgunum 10. — 24. oktober 1988, báðir dagar íroknaðir.

ARGJA KOMMUNA